Or›alisti

Or› i› ver›a n‡tt í K.T.Horninum

Alnet	Internet
Breyt	Bus
Datagrunnur	Database
Disklastø›	Diskettedrev
Fílaflutningur/fílaveiting	Filoverførsel
Flís	Chip
Forrit	Program
Gei›slaprentari	Laserprinter
Geril	Processor
Grind	Portal
Heimsta›ur/heimaøki	Domæne
Húsi	Kabinet
Innara goymsla	Interne hukommelse (RAM)
Ímynd	Ikon
Kervi	Netværk
Kjaksí›ur	Diskussionsgrupper
Klokkutídd	Clockfrekvens
Knappabor›	Tastatur
Leitibúna›ur	Browser
Leitimaskina/Netleitari	Søgemaskine
Ljóslesari	Scanner
Margmi›il	Multimedia
Minni	Memory/RAM
Móthald	Modem
Ravtøkni	Elektronikkur
Ritbúna›ur	Software
Rógva út	Surfe
Samanseting	Konfiguration
Samvirki	Interactivt
Talgildismyndatóli	Digitalt kamera
Telduprent forriti	Desktop Publishing
Tí›indasí›ur	Nyhedsgrupper
Tólbúna›ur	Hardware
Ytra goymsla	Ekstern hukommelse (t.d. HD)

Topp — 10 listin

Mest vitja›u føroysku heimasí›urnar frá www.leitel.fo

Hesa vikuna	Seinastu viku	Vikur á listanum	Sí›unavn
1	1	10	NSÍ
2	3	1	Revival
3	6	3	B68 (óalmenn sí›a)
4	2	11	#Faroese_Chat
5	5	4	Jógvan Heinesen
6	4	3	Sambandsflokkurin
7	8	2	Havnar Bóltfelag
8	7	17	Tí›indabla›i› Sosialurin
9		0	Leitel Tí›indi
10		0	Magnus Sørensen

Kelda: www.leitel.fo

Káta Horni›

Hesufer› um fyritøkuna Microsoft

WinSplit 2000

Eitt óalment tí›indaskriv, i› sigst at koma frá Microsoft Inc., bo›ar frá at tá KT-risin ver›ur b‡ttur upp í tvey virki, fær fyrsta telduforriti› frá Microsoft heiti› WinSplit2000, vi› undirheitinum Justice Served 1,0. (sí mynd).

✷ ✷ ✷

Dóttur Bill Gates og Jólama›urin

Hetta eru heimabaka›ar køkur, Jólama›urin. Tú kanst fáa tær, um bert tú lovar at n‡ta Internet Explorer 4,0 á øllum teldunum á Nor›urpólinum



Tema: Teldukeyp

4. partur – Hvat er hvat í einari teldu?

Í seinasta bla› umrøddu vit næstan allar lutir sum teldan er sett saman vi› og komu vi› rá›um um hvat skal keypast. Hesafer› halda vit fram vi› at umrø›a knappabor›, mús, joystik, prentarar og skannarar.

Knappabor›
Skal tú skriva nógv á tína teldu, er ta› sera umrá›andi, at tú hevur eitt gott knappabor› (tastatur). Ta› skal vera sterkt, kunna hellast á og vera gott at skriva á. Nakrar teldur hava sera ke›iligt knappabor›, men hetta er ikki tann stóri trupulleikin at skifta um, og er heldur ikki serliga d‡rt. Eitt n‡tt gott knappabor› liggur um 300 til 600 krónur.



Á einum ergonomiskum knappabor›i skal man helst skriva vi› 10 fingrum

Ta› ber eisini til at fáa serlig ergonomisk knappabor›. Tey eru gjørd solei›is, at tínar hendur, armar og akslar hava eina betri og rættari ergonomiska arbei›sstø›u. Hesi serligu knappabor› eru gó›, um tú skrivar nógv, men tey gera bert nyttu hjá teimum, sum brúka allar 10 fingrarnar at skriva vi›. Nakrar teldur hava knappabor› vi› nøkrum eyka knappum á, sum man kann stilla til ymisk serlig endamál, sum til dømis at st‡ra fløguspælaranum ella at koma skjótt á Alneti› vi› meira. Sjálvandi ber eisini til at keypa eitt tílíkt knappabor› eftir at sjálv teldan er keypt.

Mús
Músin er eitt ambo›, i› brúkt ver›ur at peika vi› ísta›in fyri ella saman vi› knappabor›inum. Vi› músini ber til at peika og klikka á ímyndir (ikonir) i› eru rokna›ar til endamáli›. Músin er serliga gó› í byrjanina, tá man líti› og onki veit um telduna, men í longdini skal man ansa sær, tí man fær sokalla›ar músaska›ar í handli›, alboga og øksl.

Ta› finnast nógv sløg av m‡s. Tann mest vanliga músin hevur eina kúla í botninum, sum ger, at tá tú flytur músina runt á músamáttuni, rørist ein pílur runt á skerminum.

Ta› finnast eisini onnur peikiambo›, sum til dømis trackball.

Microsoft ger eisini m‡s. Her er ein IntelliMouse

Fyri at sleppa undan at fáa músaska›ar, er ta› sera umrá›andi at finna eina gó›a mús. Men ta› er ymiskt frá persóni til persón, hvør mús er tann rætta. Har er bert eitt at gera og ta› er at royna seg fram til eina, sum liggur væl í hondini, og sum glí›ur lætt og javnt eftir skerminum. Nakrar m‡s hava tríggjar knøttar at tr‡sta á, og hesar eru betri enn tær sum bert hava tveir knøttar. Ta› ber til at stilla tann tri›ja knøttin til onkra eyka funktión, sum til dømis í sta›in fyri dupult klikk. Nakrar m‡s eru eisini serliga ætla›ar til tey, sum arbei›a nógv á Alnetinum. Tær m‡snar hava ein rulluknøtt, sum er vælegna›ur til at bla›a seg ni›ur eftir heimasí›um.

Man kann eisini fyribyrgja músaska›um vi› at brúka umvegistastir á tastaturinum í sta›in fyri músina. Ta› ber til at arbei›a heilt uttan mús.

Joystik
Eitt joystikk er ein st‡rieind, sum stu›lar undir músina. Ta› er serliga til spøl, at ta› er meira handaligt vi› einum ella fleiri joystykkum.

Prentari
Um tú vil hava arbei›i, sum tú ger á telduni, skriva› út, skalt tú hava ein prentara. Útskrivingargó›skan á einum prentara ver›ur máld í dpi (dots per inch/prikkar pr. Tumma). Gjøgnumgangandi kann man siga at jú hægri dpi-tali› er, tess betri er útskrivingargó›skan. Men dpi-tali› er ikki eitt eint‡›ugt tal, sum avger gó›skuna, so tú skal ikki leggja teg eftir ávísum dpi-tali, men heldur hyggja væl vi› egnum eygum hvussu gó›skan er.

Blekkprentari
Blekkprentarin ver›ur eisini kalla›ur Inkjet- ella Bubbeljetprentari. Blekkprentarin man helst vera tann mest vanligi prentarin til heimateldur í dag. Hann er bíligur og útskrivingargó›skan er sera gó› í mun til prísin.

Hewlet Packard blekkprentari

Um tú vil hava ein litprentara, er blekkprentarin eitt gott val, tí hann er tann einasti bíligi prentarin, sum kann skriva litir. Um tú prentar myndir út, brúkar klekkprentarin rættuliga nógv blekk, líkamiki› um ta› er ein litmynd ella svørt og hvít mynd.

Legg til merkis, at flestu blekkprentarar krevja at tú brúkar eitt ávíst slag av blekkpatrónum, fyri at trygdarváttanin (garanti) frá seljaranum skal halda.

Geislaprentari (Lasarprinter)
Geislaprentarin er tann prentarin sum hevur bestu útskrivingargó›skuna til tekst. Hann er eitt sindur d‡rari at keypa enn blekkprentarin, men bíligari í n‡tslu. Um tú hevur stóran tørv á at skriva út, er geislaprentarin tann bíligari prentarin í longdini.

Hewlet Packard geislaprentari

Nálaprentarin
Nálaprentarin ver›ur vanliga eisini kalla›ur matrixprentari. Ta› ver›a ikki serliga nógvir nálaprentarar seldir í dag, tí blekkprentarin er vor›in væl bíligari. Men ein eginleiki, sum bert nálaprentarin hevur, er at hann kann skriva vi› gjøgnumslagi á sokalla› idempappír.

Ljóslesari (Skannari)
Ein ljóslesari ver›ur brúktur til at lesa inn myndir og tekst beinlei›is frá pappíri og í telduna. Ta› finnist ein ørgrynna av forritum til at arbei›a og vi›gera myndir vi› og forrit, sum kann lesa tekstin av einum pappíri og inn í til dømis eina tekstvi›ger›. Um tú ætlar at arbei›a vi› myndavi›ger› mást tú eisini hava ein ljóslesara, fyri at lesa tínar myndir inn í telduna ella eitt talgildismyndatól.

Ljóslesari

Talgildismyndatól (Digitalkamera)
Vi› ein talgildismyndatóli kanst tú taka myndir, sum vi› einum vanligum myndatóli, og aftaná leggja myndirnar inn í telduna til ví›ari vi›ger›. Talgildismyndatól hava veri› rættuliga kostna›armikil, men í dag fæst eitt hampuligt tól fyri umlei› 3-5000 krónur.

Talgildismyndatól frá Canon

Í næstu viku halda vit fram vi› at hyggja at ymiskari eykaútger›, so sum móthald (modem) og margmi›laútbúna›i herundir fløguspælara, hátalarum og ljó›korti, sum antin fylgir vi› ella vit kunnu keypa eyka til telduna.

sid@sosialurin.fo
kelda: www.fs.dk

...en klókari



Com-Data byggir omaná hugskotini hjá øðrum. Her stendur søluleiðarin, Heini Hansen við einum lítlum hitamátara, sum er ein amerikansk uppfinning. Hesin luturin verður nú nýttur í eini føroyskari telduloysn, ið skal bøta um góðskuna á føroyskum fiskavørum.

Keypmannahavn og í Grønlandi.

Men so kom skrædlið.

Búskaparliga kreppan í Grønlandi fyrst í 90-unum sló beinini undan Com-Data/Green, sum framleiddi telduskipanir til grønlendsku fiskavirkini. Grønlendska heimastýrið yvirtók deildina og samstundis mátti deildin í Keypmannahavn lata aftur, tí hon var liður í Grønlands-ævintýrinum.

Kreppan í Føroyum elvdi til, at Com-Data í Føroyum kom í fíggjarligar trupulleikar. Og í 1994 var fyritøkan endurstovnað av nøkrum starvsfólkum.

Í dag er ein glashurð á høvuðsdeildini í Klaksvík, við áskriftini »Com-Data Danmark«, einasta sjónliga minnið um stórleikatíðina í 80-unum. Eina tíð, tá fyritøkan slóðaði fyri á teldu-økinum í Føroyum og tá Com-Data – sambært egnu heimasíðuni hjá fyritøkuni – var eitt navn, sum allir føroyingar vóru stoltir av.

Meir til menning
Umstøðunar hjá Com-Data í dag kunnu slett ikki sammetast við støðuna fyri 15-20 árum síðani, heldur dagsins stjóri í Com-Data. Tað var ein stórur fyrimunur, at vera fyrstur á einum spildurnýggjum marknaði, heldur Olivur Thomsen, sum sammetir føroysku EDV-søguna við gongdina í tónleikaídnaðin.

– Fyrr kundi alt mennast, tí har var einki frammanundan. Tá var nóg mikið, at tú spældi ein sang inn. Nú mást tú endurspæla sangin og gera hann enn betri, sigur hann.

Olivur Thomsen sigur, at stóri munurin á støðuni í dag og í 80-unum er, at fyritøkan hevði nógv betri ráð at menna seg tá:

– Tá høvdu vit nógv betri ráð at gera nakað enn vit hava í dag. Tað var lættari at koma við nøkrum nýggjum og krøvini vóru smærri. Av tí, at vinningurin var so stórur, so høvdu vit betri ráð til menning, sigur hann.

– Fyrr høvdu vit tann stóra teldumarknaðin, sum vit kundu byggja út. Nú mugu vit arbeiða frá verkætlan til verkætlan, sigur stjórin.

Søluleiðarin, Heini Hansen málber so soleiðis um 80-ini í EDV-heiminum:

– Tað var næstan sum at finna ein 100-krónuseðil og kopiera hann. Alt var vinningur, sigur deildarleiðarin, sum heldur, at størsta mistakið var, at Com Data vaks ov skjótt.

– Veksur ein fyritøka ov skjótt missir tú lættliga tamarhaldið á henni, sigur hann.

Størri krøv
Leiðslan á Com-Data vísir á, at fólk eru blivin nógv meira upplýst, tá tað ræður um teldur, og at hetta setir krøv til fyritøkurnar í KT-vinnuni.

Í dag eru teldufyritøkurnar í stóran mun ein samstarvsfelagi hjá brúkarunum, sum hevur lært seg at seta krøv, sigur Olivur Thomsen.

– Fyrr fegnaðust fólk bara teldan tendraði. Nú eru fólk misnøgd um tað, sum teldan ikki dugir, sigur stjórin, sum heldur, at gongdin er góð fyri kundan, tí hon noyðir KT-fyritøkurnar, at finna tær bestu loysnirnar.

– Brúkarin er blivin ótrúliga avanseraður, staðfestir stjórin.

...føroyskum loysnum

teirra góðu teoretisku bakgrund, sigur Heini Hansen, og sipar harvið til, at starvsfólkini eisini mugu vinna sær royndir av praktiskum slagi í KT-vinnuni.

Serloysnir

Olivur Thomsen arbeiðir við at menna loysnir á heilt nýggjum økjum. Sum t.d. eina skipan, at skráseta hitan í føroyskum fiskavørum, sum eru ávegis til marknaðin. Sjálvur hitamátarin er innfluttur úr USA og kundi verið nýttur til eitthvørt endamál. Olivur hevur brúkt mátaran í eini elektroniskari loysn, ið kann bøta um góðskuna á føroyskum fiskavørum. Tað er hansara uppfinnilsi.

– Tað er als eingin grund, at uppfinna krútið umaftur, sigur Olivur Thomsen. Hugskotið er at byggja omaná hugskotini hjá øðrum og laga tey til tørvin hjá føroyskum arbeiðsplássum, sigur hann.

– Styrkin hjá Com-Data er at finna serstakar loysnir, sigur stjórin, sum heldur, at, gongdin innan EDV-yrkið er ein alsamt størri spesialisering:

– Fyrr dugdu allir pisubókina. Nú er eitt ótal av pisubókum, sigur Olivur Thomsen, sum er sannførdur um, at tað framhaldandi verður tørvur á smáum uppfinnarum sum Com-Data undir liðini á risafyritøkum sum Microsoft og MacIntosh.

– Eg eri vísir í, at vit kunnu levera eitt petti av eini heildarloysn, sigur hann.

FOKUS

Ivan Joensen arbeiðir á verkstaðnum hjá Com-Data í Klaksvík

Com-Data

● Com-Data selir telduútgerð, netútbúnað og telduforrit.

Fyritøkan framleiðir eisini egin telduforrit og loysnir, sum eru snikkaðar til eftir serstaka tørvinum hjá føroyskum arbeiðsplássum. Nógvir stórir brúkarar eru millum kundarnar hjá Com-Data, bæði stovnar, handlar og fyritøkur. Ikki mist fiskavirkini eru millum týdningarmiklu kundarnar.

● Com Data var stovnað í 1980, men endurstovnað í 1994. Í dag eru tvær deildir, ein á eystari armi í Klaksvík og ein minni deild í Saltangará. Gott og væl 20 fólk - forritarar, sølu og hjálparfólk, teknikarar og skrivstovufólk - eru knýtt at fyritøkuni. Com Data hevur onga deild í Havn longur, men fyritøkan samstarvar við felagið ITEC í Havn.